# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Atlantsmót í fokus

Tíðindini í gjár um, at oljufelagið Total hevur funnið eina gasskeldu miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið, mugu sigast at vera sera kærkomin fyri framtíðina hjá Atlantsmótinum, sum er tað stóra økið millum Hetland og Føroyar og sum í ein sunnan og norðan røkkur úr Írlandi til Noregs. Tað er tó serstakliga økið millum Føroyar og Hetland, sum í løtuni hevur stóra áhugan hjá oljufeløgunum. Seinasta gassfundið verður kunngjørt nett-upp um somu tíð sum ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri bretsku stjórnina DTI og oljufeløgini, DONG, Total, Chevron, ENI og Statoil er við at gera eina frágreiðing um, hvussu oljufeløg og myndugleikar í felag kunnu skunda undir útbygging av olju- og gassfeltum á bretska landgrunninum. Bretski heimamarknaðurin hungrar eftir orku og fer at verða stórur tørvur á ikki minst gassi til mongu brúkararnar í Bretlandi í framtíðini. Tað hevur eisini nógv at siga fyri Bretland ikki at vera ov bundin at gassleveransum úr Ruslandi. Nettup tí koma tíðindini um eitt stórt gassfund í bretskum øki sera væl við.

Og hesi tíðindi koma eisini væl við hjá okkum føroyingum, sum helst síggja, at nógv leitivirksemi og útbygging fer fram á Atlantsmótinum sum heild. Hóast henda seinasta keldan liggur inni á bretskum øki, so letur hon fleiri dyr upp til okkara landgrunn og leiting her. Stóri spurningurin viðvíkjandi leiting á føroyskum øki fer at verða, hvat vit skulu gera við møgulig gassfund ella um nógv gass er tengt at eini oljukeldu. Neyðugt er við rørleiðingum tvs. infrakervi, sum kunnu flyta gass til lands, um tað skal løna seg at fara undir at útbyggja gasskeldur. Við hesum seinasta gassfundinum eru vit nógv nærri eini loysn, har fleiri gasskeldur vestan fyri Hetland verða útbygdar og knýttar upp í eina rørleiðing, sum antin flytur gassið til Hetlands ella helst til gassterminal í Skotlandi. Tað er slíka skipan, sum møguligar olju- og gasskeldur á føroyska landgrunninum, kunnu knýtast upp í. Tað er ógvuliga áhugavert at merkja sær, at fleiri av feløgunum, sum eru uppi í hesum verkætlanum og loyvum, eru virkin her hjá okkum.

Samanumtikið er nógva virksemið bæði út á landgrunnunum báðum og fundarvirksemið ein ábending um, at Atlantsmótið er við at gerast ein oljuprovins, sum vil og kann nakað. Chevron tykist hava eydnu við royndarframleiðslu frá Rosebankkelduni skamt frá markinum, Cambokeldan, nakað syðri, liggur bara og bíðar eftir palli at staðfesta tað fundið, Total fer nú av álvara at taka fram eina gassútbyggingarætlan, og ikki minst, BP fer í næsta mánað at seta á Williamleiðina.

Sosialurin

## Viðmerking til uppskot um broyting av vallog og til føroyska valstríðið

**BEINTA Í JÁKUPSSTOVU**

Kjakið um broytan av vallógini fyri at veljararnir fáa eina meira rættvísa umboðan á tingi hevur higartil bert snúð seg um fyrimunir og vansar við bert at hava eitt valdømi í Føroyum. Nú gongd er komið á kjakið, er tað umhugsunnarvert at hugsa um aðrar ábøtur, sum kanska kunnu gera løgtingsval (og kommunuval) meira rættvís – í mun til tær ymisku hugsanirnar um hvat ið er røtt demokratisk umboðan:

• Matematiskt rættvísi: Hvør veljari skal við sínari atkvøðu hava somu ávirkan sum grannin á, hvør ið kemur á ting. Sum er, fara nógvar atkvøður "til spillis", tí flokkurin einki umboð fær. Men matematiskt rættvísi ber illa til at sameina við aðrar hugsanir um rættvísa valskipan.

• Rættvísa økisumboðan: Øll øki í landinum eiga at vera umboðaði, og tað er best, um tað eru fleiri umboð fyri hvørt øki, so at ikki bara ein skal tosa teirra sak. Hin vegin má talið á økisumboðum regulerast í mun til gongdina í búsetingarmynstrinum í landinum, so at tað ikki skulu mundandi fleiri atkvøður til at fáa eitt umboð í einum øki enn í øðrum økjum.

• Rættvíst býti millum flokkarnar: Tað eigur at vera samsvar millum atkvøðuúrslitið og tingmannabýtið millum flokkarnar. Fyri at fáa eina rættvísa uppgerð, hava mong lond valt at brúka tær einføldu skipanirnar d'Hondt ella St. Lague, sum eru frá tíðini áðrenn teldutøkni. Í dag eru eisini aðrar skipanir at velja í, sí t.d. uppskotið frá Peturi Zachariassen. – Býtið millum umdømisvald og eykalimir er eisini ein máti at gera flokksumboðanina meira rættsvísa.

• Rættvíst kynsbýti: Undirumboðanin av kvinnum skuldast m.a. at veljararnir geva kendum og royndum politikarum sína atkvøðu, og flestu politikarar, sum sita á tingi (ella í bý- ella bygdaráðum), eru menn. Um fleiri kvinnur skulu verða valdar, er ikki nóg mikið, at flokkarnir seta kvinnur á listan. Flokkarnir mugu eisini siga greitt frá, at teir mæla fólki til at velja hesar kvinnur. – Ein máti at fáa javna umboðan av kvinnum og monnum er at fara aftur at stilla upp í nummarrøð. Tá hevði flokkurin kunna ávirka, hvørji ið vórðu fyrst vald, ein kvinna ella ein maður.

• Rættvíst valstríð: Allir samfelagsbólkar (stættir) í samfelagnum eiga at hava sama rætt til umboðan. Formelt eru eingin krøv longur til, at tey sum luttaka í politikki, skulu hava ogn ella góða inntøku. Reelt er tað vorðið ein trupulleiki, og ein vaksandi trupulleiki, í Føroyum, at tey, sum verða vald, sjálvi mugu fíggja valstríðið. Hetta kann føra til a) at tey múgvandi hava fyrimunir og verða betri umboðaði og/ella b) at tey, sum stilla upp, kunnu verða freistaði til at taka móti muturi, við tað at tey fáa peningahjálp til valstríðið móti at gera gevaranum ein beina, tá politiskar avgerðir skulu takast. Eg veit einki um korruptión í Føroyum, men síggi, at verandi skipan gevur gróður fyri tí. Eftir mínari meting er hetta størsta vandamál fyri føroyska fólkaræðnum.

Ymisk tiltøk kunnu setast í verk fyri at forða fyri, at privatar peningaíløgur ikki skulu vera vegurin til politiskt vald. Summi tiltøk kunnu setast í verk beinanvegin, onnur taka longri tíð, tí at vallógin má broytast og/ella nýggjar lógir/reglugerðir mugu setast í verk.

1) Krøv til rokniskap um hvussu valstríðið er fíggjað, og almannakunngerðing á alnótini av hesum rokniskapi kann kanska minka um vandan (sí t.d. finsku skipanina). Í hvussu er hevði hetta kunna broytt hugburðin til at taka móti peningahjálp frá privatum.

2) Flokkarnir kunnu taka størri stýring á valuppstilling og valstríðið. Um flokkarnir t.d. fóru aftur til uppstilling í nummarrøð, hevði stríðið innanhýsis í flokkinum verið liðugt, tá listin var liðugur. Flokkurin kundi agitera fyri sínum bestu fólkum, um tað so eru kvinnur ella menn, múgvandi ella láglønt. Um valdømini eru stór ella kanska bara eitt, ber til hjá flokkinum at syrgja fyri, at umboð fyri alt landið koma á ting.

3) Og so tað, ið eigur at gerast beinanvegin: Kostnaðurin fyri at føra valstríð má niður. Bløðini mugu gevast við at krevja pening fyri blaðgreinir undir valstríðnum!

## Enn ein stovnur bygdur í Havn, Granskingarpark fyri 70.000.000!

**VINJARD JOHANSEN**
Varamaður á løgtingi



Kringvarp Føroya kunngjørdi týsdagin 28. august, at nú verður granskingarparkin enduliga bygd. Við tøttum samstarvi við Tórshavnar kommunu hevur man valt at leggja depilin á Debesartrøð, tætt við Sjómansskúlan. Parkin verður liðug í 2009, og kostnaðurin verður uml. Kr.70.000.000.

Tað hevur verið dúgliga tosað um útjavning í samgonguni, og at leggja stovnar út í útjaðaran, men spurningurin er, um hetta ikki bert eru tóm orð og tala.

Eitt hugskot til Bjarna Djurholm og hinar í samgonguni, kundi verið at lagt Sjómansskúlan norður til Klaksvíkar, Fróðskaparsetrið har Sjómansskúlin er í løtuni, og Granskingarparkina inn á Skálafjørðin.

Eg vildi mett, at allar kommunur, við tøttum samstarvi, vildu arbeitt seg fram ímóti at fáa ein slíkan stovn at liggja júst í teirra øki, høvdu tær bert verið spurdar.

Lat nú tosið um útjavningina verða meira enn tóm orð.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.